UTTAN ÚR HEIMI

## Svikin børn

Gerandisdagurin hjá nógvum brøvnum í Eysturgrønlandi er sera trupul, tí børnini fáa als ikki neyðuga umsorgan, sigur danski filmsleikstjórin Karen Littauer við sjónvarpið DR.

Karen Littauer hevur verið nógvar ferðir í Grønlandi og kennir viðurskiftini væl. Hon sigur, at í teimum smáu bygdunum í Eysturgrønlandi eru nógv børn, sum hava tað ringt. Ein orsøk er, at foreldrini drekka ov illa, men harðskapur er eisini ein orsøk, sigur hon.

Bente With, sum er formaður í felagsskapinum Grønlandske Børn, váttar tað, sum Karen Littauer sigur.

- Vit vita, at børn ganga køld og svong. Vit vita, at børn verða misbrúkt kynsliga, og at tey eru fyri øðrum harðskapi, sigur Bente With við DR. Sjálv heldur hon, at politikararnir eiga at leggja uppí, tí blokkstuðul loysir ikki ein trupulleika sum hendan, sigur hon.

## Roykibann á veg

Higartil hava Írland, Noreg, Italia, Svøríki og Malta sett fólki forboð fyri at roykja á matstovum og vertshúsum, og nú fyrireika politikararnir í Fraklandi eina tilsvarandi lóg har.

Kanningar vísa, at politikararnir fáa dygga undirtøku í hesum máli. Seinasta vikuskiftið vísti ein kanning, at heili 72 prosent av teimum spurdu taka undir við einum forboði ímóti royking á matstovum og vertshúsum, og 33 prosent svaraðu, at tey ætla sær at vitja matstovurnar oftari, tá roykibannið kemur í gildi. 15 prosent søgdu tað øvugta. Hagtøl vísa, at umleið 35 prosent av øllum vaksnum fransmonnum roykja, og í øðrum kanningum hava 44 prosent av roykjarunum sagt, at tey kenna seg órógvað av royki frá øðrum, tá tey sita á matstovu.

Fronsku heilsumyndugleikarnir siga, at hvønn dag doyggja 180 fransmenn av sjúkum, sum kunnu tengjast at royking. Sjey teirra hava kortini ongantíð fest sær í.

## Nokia-stjórin fer frá

Aðalstjórin í finsku stórfyritøkuni Nokia, Jorma Ollila, hevuir kunngjørt, at hann leggur frá sær 1. juni næsta ár, og samstundis hevur nevndin í fyritøkuni gjørt av, at Olli-Pekka Kallasvuo skal taka við. Hann er í løtuni leiðari á fartelefondeildini hjá Nokia.

Jorma Ollila byrjaði at arbeiða hjá Nokia í 1980. Hann hevur verið aðalstjóri tey seinastu trettan árini, og eygleiðarar eru á einum máli um, at hann hevur verið sera dugnaligur. Hinvegin er greitt, at tann næsti stjórin fær eina stóra avbjóðing. Nokia hevur í dag umleið 33 prosent av altjóða fartelefonmarknaðinum, men kappingin frá amerikonskum og asiatiskum fyritøkum er hørð. Tað hevur elvt til harða prískapping, sum aftur ávirkar rakstrarúrslitið.

Nokia hevur tó onga neyð. Herrfyri kunngjørdi fyritøkan, at hon hevði næstan seks milliardir krónur í avlopi fyrra hálvár í ár. Tað var kortini minni, enn fíggjarmarknaðurin hevði væntað, og virðið á partabrøvunum í fyritøkuni fall eisini nógv.

## Keypa nógvar teldur

Danir keypa teldur sum ongantíð fyrr, og tað eru serliga tær berbaru teldurnar, sum eru væl umtóktar.

Teir fyrstu seks mánaðarnar í ár vórðu næstan 475.000 teldur seldar í Danmark. Tað er tað mesta nakrantíð og umleið 30 prosent meiri enn í sama tíðarskeiði í fjør. Ein orsøk er kortini, at fleiri stórar fyritøkur so sum Danske Bank og Nykredit hava keypt nýggjar teldur ístaðin fyri tær gomlu, men tann privata sølan er eisini vaksin nógv. Mett verður, at í dag eru næstan tvær teldur í meðal í hvørjum húsi í Danmark.

Mest selda teldumerkið í Danmark er Hewlett-Packard, sum átti 24 prosent av marknaðinum fyrra hálvár í ár. Síðani komu Dell við 18 prosentum, IBM við 13, og Fujitsu Siemens og Acer áttu 12 prosent í part.

# Nú fáa børnini at eta

**Tann fyrsta útlendska matvøruhjálpin er nú komin til Niger, men tað fer at taka fleiri dagar at fáa hjálpina fram til øll tey svøltandi**

HUNGUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í gjár vóru umboð fyri ein bretskan hjálparfelagsskap í bygdini Bamou við mjøli og ymsum øðrum matvørum, sum vórðu býttar ímillum 180 mammur og børn teirra. Men fleiri mammur noyddust tómhentar heimaftur, tí hjálparfelagsskapurin hevði ikki fingið nóg mikið av mati til øll. Mammurnar mugu ugga seg við, at ein spanskur hjálparfelagsskapur ætlandi kemur við meiri mati til Bamou fyrsta dagin.

Bamou er í landspartinum Tahoua. Myndugleikarnir í Niger siga, at støðan er serliga álvarssom har, men at hungursneyðin eisini er farin at gera um seg í trimum øðrum landspørtum.

ST heldur, at umleið 3,5 milliónir fólk ella meiri enn ein fjórðingur av fólkinum í Niger hava ov lítið til matna. Av teimum eru 800.000 børn. Heimsmatvørustovnurin World Food Program fer at býta umleið 4.000 tons av matvørum út teir næstu dagarnar, og gongst eftir ætlan verða umleið 23.000 tons býtt út teir báðar næstu mánaðarnar, skrivar Reuters.

# Heykurin skal samstarva

**Hóast mótmæli frá Senatinum hevur George W. Bush, forseti, sett tann umstrídda John Bolton at umboða USA í ST**

TILNEVNING

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Demokratarnir í Senatinum hava roynt alt til tess at forða fyri, at John Bolton bleiv valdur til at at umboða USA í ST. Teir hava undir avhoyringum avdúkað, at hann er alt ov snarsintur, at hann fleiri ferðir er farin burtur frá vanligari mannagongd og hevur gingið egnar leiðir, og at hann hevur havt ilt við at samstarva við onnur.

Men mánadagin misti forsetin tolið við Senatinum og boðaði frá, at hann hevði nýtt eina heimild í stýrisskipanini, sum sigur, at forsetin kann tilnevna ST-sendimannin uttan góðkenning frá Senatinum. Í slíkum førum er starvstíðin hjá sendimanninum kortini avmarkað, og John Bolton er tí fyribilssettur til 1. januar í 2007.

Tað ikki hent síðani 1948, at ein amerikanskur forseti hevur tilnevnt ein ST-sendiharra uttan góðkenning frá Senatinum, og demokratisku senatorarnir halda tað vera óheppið, at USA skal hava ein sendimann í ST, sum ikki hevur fingið ta vanligu góðkenningina. Men Bush sigur, at hann og stjórnin kunnu ikki bíða longur.



*John Bolton verður roknaður sum ein av heykunum í Bush-umsitingini. Nú skal hann umboða USA í ST*

*Mynd: Reuters*

- Hesin sessurin er alt ov týdningarmikil, til at hann kann standa tómur, serliga nú landið er í kríggi, og nú ætlanir eru um nýskipanir í ST, segði forsetin, tá hann kunngjørdi avgerð sína.

ST-diplomatar hava roynt at doyva kjakið um John Bolton, og Kofi Annan var eisini varin, tá hann gjørdi sínar fyrstu viðmerkingar til tilnevningina.

- Tað er í lagi, at ein sendimaður leggur trýst á, men ein sendimaður eigur at hava í huga, at hann skal sannføra 190 aðrar ella í hvussu er ein stóran meiriluta av teimum, skal hann fáa nakað burturúr, segði ST-aðalskrivarin. Hann legði afturat, at sjálvur ætlar hann sær at samstarva við John Bolton sum umboð fyri amerikanska forsetan og stjórn hansara.